## DAGSINS MEINING

# Teir líkjast sær sjálvum

Um ein kvettir í seinasta Dagblaðið, so líkjast teir sær sjálvum. Oddagreinin líkist mest teimum, man plagdi at síggja, tá blaðstjórin var í vælmaktini fyri 15 – 20 árum síðani. Hesuferð er tað serliga Tjóðveldið og Torbjørn Jacobsen, ið fáa toyggið.

Vit hava sagt tað fyrr og siga tað enn einaferð. Torbjørn Jacobsen fær neyvan nakra premiu fyri síni diplomatisku evni, men Dagblaðið stendur einki aftanfyri í so máta. Tað er eingin loyna, at Fólkaflokkurin hevur ein rættiliga alternativan máta at tulka fría initiativið uppá. Teir tykjast eisini hava eitt nokkso avslappað forhold til landskassans ognir. Torbjørn Jacobsen fór kanska ikki heilt skeivur tá hann karakteriseraði sjálvan Fólkaflokkin og teirra vinnupolitikk ella mangul uppá sama, men hann átti at lært at vandað sær eitt sindur um orðini.

Tað er tíbetur at undirmeta fólk, tá øll skulu skerast um sama kamb sum leiðslan í Fólkaflokkinum. Trupulleikin hjá Torbjørn Jacobsen er, at hann mangan skjýtur við ov spreiddum høglum og tí rakar stórt sæð øll, sum stinga nøsina fram. Tá hann skýrir alt á økinum hjá Djurholm politiskar setanir, so ger hann seg sekan í tí, hann ákærir Fólkaflokkin fyri, nevniliga at blanda politikk upp í alt.

Tað kann ikki koma óvart á Tjóðveldisflokkin, at Fólkaflokkurin fellur aftur á gomlu slóðina. Hann er nú einaferð tann sami flokkur, hann altíð hevur verið. Tá nú friður er á ríkisrættaliga økinum, so gerast undarligu dispositiónirnar hjá Fólkaflokkinum meira sjónligar, enn tá rumbul er á ríkisrættar-liga økinum. Tó eigur man at hava somikið av áliti á fólk flest, at tær ætlanir, ið kreativi parturin av Fólkaflokkinum leggur, ikki gerast veruleiki. Torbjørn Jacobsen má ansa eftir ikki at politisera alt og øll, tí kanska er hann í so dapurskygdur viðvíkjandi støðuni við tí, sum hann nevnir “hornblásarnir hjá Djurholm”. Tjóðveldisflokkurin átti kanska at rannsakað seg sjálvan og hugsað um, hví man yvirhøvur situr í samgongu við Fólkaflokkinum, tá hann nú eftir øllum at døma er so ringur at fáast við. Skrivingin hjá Tórbjørn Jacobsen hevur í hvussu er víst okkum, at hetta verður neyvan tann einglasamgonga, sum eitt nú formaðurin í Tjóðveldisflokkinum ynskti eftir valið.

Tað skal sigast, at eitt slíkt álop, sum Torbjørn Jacobsen fekk í seinasta Dagblaðnum bendir á, at hann ikki er á heilt skeivari kós. At fáa eitt álop í Dagblaðnum er oftani eitt tekin um, at man er á rættari leið, og eigur Torbjørn at halda fram við tí, tó uttan at skjóta eftir øllum,sum rørir seg.Tað skal undir øllum umstøðum verða eini vælmeint ráð til Torbjørn Jacobsen at gevast við at undirmeta fólk, ið standa uttan fyri politisku skipanina, við at politisera alt og øll. Harafturat eigur hann í allari almindeligheit at minnast til, at tað ger einki, um man hugsar seg um tvær ferðir, áðrenn man sigur nakað, tí at “det tænkte ord kan altid siges, det sagde ord kan aldrig ties”.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fiskimenn & hornblásarar!

**Tórbjørn Jacobsen**



Sivar í Kunoy, sáli, var eldri maður tá ið hann flutti til Havnar at búgva. Fleiri av børnunum búðu har, so hetta var lagað manni. Ein dagin møtti hann einum øðrum norðoyingi á Vaglinum. Spurdur hvussu hann treivst í Havn svaraði Sivar, at tað var ikki verri enn ilt, men hann skilti bara ikki hvussu fólkið í býnum fekk tað at standa upp og niður, - fíggjarliga. Sum hann segði: "Her eru 25 fiskimenn og 300 hornblásarar."

Allir høvuðsstaðir og administratiónbýir hava sítt egna lív, sum kann vera trupult at skilja hjá einum bygdamanni, sum veit, at í minsta lagi ein handalig inntøka skal til, fyri at halda svongdini frá durðunum.

Nú fari eg fyrst av øllum at umbera, at feriuidyllurin hjá Djurholm og hansara hornblásarum var órógvaður. Helt ikki, at stungið varð so djúpt, at øll grindin kom upp í einum og legði beinini. Men blóðið í sævarmálanum er øgiligt á at líta. Krampadrátturin mikil. Og tær flestu skápshurðarnar standa nú víðopnar. Tað sæst inn á bein. Mørkini kámaði. Eingin veit nú hvør er landsstýrismaður, spinndoktari, nevndarformaður o.s.fr.

Fólkaflokkurin hevur ikki sett ein barnaskúlalærara út í Vinnumálaráðið fyri at stjórna nøkrum sum helst. Tað munna tey flestu hugsa. Hann er settur har fyri at tæna ávísum áhugamálum. Og annars bara at makka rætt, tá ið tær gráu eminansurnar krevja tað. Fyri at stabilisera mannin í sessinum, velur man so nakrar apparatjik´arar at halda galliónsfigurinum føstum í stevninum.

Ætlar tú at rota eitt samfelag upp, so skal tú brúka hendan leistin. Tá ið nevndir og stjórasessir verða settir, er fakligur førleiki og vanligt skil óviðkomandi. Kanska ein skaði fyri duldu áhugamálini. Partíkortið og gamlar innanhýsistænastur eru innfallsvinkulin. Gerast eftirhondini reglan. Soleiðis var tað í Føroyum og soleiðis var tað í kommunistalondunum eystanfyri. Eingin varnaðist nakað fyrrenn múrarnir rapaðu og tjøldini skræðnaðu.

Nýggja stýrisskipanarlógin og ráðini hjá Normann skuldu fáa alt aftur á beint. Tað gekst so toluliga at byrja við, men nú er rot komið í aftur. Eftir øllum at døma vera uttanveltaðu tilráðingarnar frá embætisverkinum ikki fylgdar. Partísoldatarnir verða tiknir framum. Av góðum grundum. Kanska átti fólkið at fingið at vita frá vinnumálaráðharranum hvussu nevndartilráðingin frá embætisverkinum var tá ið nýggja nevndin í Framtaksgrunninum skuldi veljast. Var m.a. nakar av verandi limum beinleiðis frámæltur? Hvussu við nýggja ferðaráðnum? Føroya Tele? Atlantsflog?

Í Tjóðveldisflokkinum vóru vit greiðir yvir hvør ætlanin var. Vitstu at kjarnudepilin í samgongusamráðingunum gjørdist yvirskipaði vinnupolitikkurin, og hvussu almennu ognirnar skuldu handlast. Sjálvandi fingu vit rætt. Endamálið hjá Fólkaflokkinum við einum sjálvstýrislandsstýri er hvørki sjálvstýri, yvirtøkur, sjálvbjargni ella nakað annað sum kjálkar upp ímóti hesum. Endamálið er altíð at opna húsarhaldskassan hjá skattaborgarunum, soleiðis at ósjónliga elitan í flokkinum kann súgva til sín sum frægast. Eftir eina rokmikla nátt vóru teir steðgaðir. Og skuldi nakar ivast, so er tað orðingin hjá Tjóðveldisflokkinum sum nú stendur í samgonguskjalinum, og hana halda vit rimmarfast um, soleingi vit eru ein partur av hesi avtalu.

Kanska hevur hesin politiski vinningur tjóðveldisfloksins longu havt tað við sær, at Djurholm meiri ella minni er desavoueraður, nú tá ið hann ikki kom á tað málið, sum elitan kravdi av honum, - afturfyri sessin. Formaðurin í Framtaksgrunninum úttalar seg nú, sum um tað er hann, ið er landsstýrismaður. Verjir røttu áhugamálini hjá Fólkaflokkinum. Verjir Djurholm móti "ófólkaligum" álopum. Undarlig kensla, at ein advokatskrivstova, sum sat á ákærubeinkinum ein stóran part av nítiárunum, nú skal sita og forvalta og handla landsins stóru ognir.

Men Niels skal vita, at lívið hjá landsstýrismanninum liggur í hansara hondum. Hann er valdur "politiskt" í framtaksnevndina fyri at fremja eitt mál, sum harða kjarnan í Fólkaflokkinum hevur sett út í kortið. Men hetta er ikki politikkur landsstýrisins. Og verður hesin ikki fylgdur, fær tað avleiðingar fyri mannin í Nesinum. Tað skal tú ikki ivast eina løtu í. Ringt er at liva við einum løgmanni og einum fiskimálaráðharra, sum, orsaka av eini gloymdari fortíð, har, ið ilt var at skyna á mørkunum, ímillum eins egna og annara, ikki kundu sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi í heiminum, men at hava ein vinnu-

*Framhald á síðu 11*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra mamma, omma og langomma okkara

**Lena Nielsen**

fødd Nicolaisen, Tórshavn

andaðist leygardagin 6. juli 86 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum týsdagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Johan, Annie og Eydna**

---


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




*Framhald av síðu 10*

málaráðharra sitandi, sum gongur diamentralt ímóti samfelagsins og politisku áhugamálunum hjá størsta flokki í samgonguni, tað verður ikki tolt.

Ein av uppgávunum hjá einum tingmanni er at hava eyguni við byrjandi roti í landsins stýri. Tað sum er sagt og skrivað hevur bara til endamáls, at lúka ókrútið burtur, áðrenn tað breiðir seg í allari veltuni. Verður hendan partípolitiska nepotisman vard og harvið legitimerað, hvat verður so tað næsta? Kanska at Bill Justinussen skiftir ein part av nevndini í Húsalánsgrunninum út, og setir, bara fyri at taka eitt dømi, Heina Lútzen og Tord Niclasen í nevndina ístaðin. Sjálvt um teir ivaleyst eru skikkaðir, so mundu tey flestu helst hildið, at kriteriiini meira vóru partapolitisk og religiøs, heldur enn tað sum ein objektiv tilráðing frá embætisverki hansara var komin fram til. Skuldi Tjóðveldisflokkurin havt trupulleikar av hesum sama slagi, skal eisini hann taka betri partar fyri seg, hiðani og frameftir.

Ansast má eftir at hornblásararnir ikki gerast ov fjølmentir. Trupult at stjórna einum stórum orkestri. Skjótt kann disharmoniiur koma í. Og hvørjir eru hesir gævu vinnumenn, ið seminaristurin tosar um, og sum onkur hevur nevndarplaserað íkring Vinnumálaráðið. Ikki teir sum fjølga um inntøkur landsins. Tað einasta teir kenna til vinnu, er tá ið prosent-satsurin skal ásetast í handli og vandli. Lortur hevur ongantíð verið undir neglini. Kanska eru teir eisini loðnir í lógvunum. Eitt slag av politiskt "yvirkvalifiseraðum" stakittpissarum. Tá ið einki politiskt evangeliið er innanborðað, fær tað ikki verið øðrvísi, sum gamli deknurin á Nesi so vísiliga tók til á sinni.

Δ

# Útoyggjafelagið gevur blað út og skipar fyri stevnudegi

**Fríggjadagin stóð Glóðin klár á sølubúðum kring landið. Hetta er blað, sum Útoyggjafelagið hevur givið út við tí endamálið at skapa meir kunning um lív og umstøður á útoyggjunum kring Føroyar**

ÚTOYGGJAR
*Ragnhild Ellingsgaard*



*Olga Biskopstø, nevndarlimur í Útoyggjafelagnum, vónar at síggja nógv fólk til stevnudagin í Skúvoy*

- Navnið Glóðin kemst av, at ein glóð líkasum er ímyndin uppá lív. Um glóðin slóknar, so doyr hon og gerst køld. Men við at arbeiða uppá glóðina fært tú so við og við skapt ein størri loga, sigur Olga Biskopstø, nevndarlimur í Útoyggjafelagnum um orsøkina til heitið, sum nýggja blaðið hevur fingið.

Blaðið Glóðin kom fyri fyrstu ferð út fríggjadagin, og er endamálið fyrst og fremst at lýsa lívið og umstøðurnar á útoyggjunum kring allar Føroyar.

- Endamálið er eisini at marknaðarføra útoyggj-arnar og gera tær meiri sjónligar, eisini fyri fólki á meginøkinum, sigur Olga.

### Skapa samanhald

Hon heldur, at útoyggjarnar ofta tykast sera fjarskotnar fyri fólki, sum liva inni á meginøkinum. Við blaðnum vóna tey at fáa fólk at hugsa um og skilja umstøðurnar hjá øllum teimum, sum av eini ella aðrari orsøk ikki búleikast á meginøkinum.

Harafturat ynskja tey eisini við blaðnum at skapa samanhald og samansjóða útoyggjaíbúgvarnar, tí tey eru øll í somu støðu og dragast við somu trupulleikar.

- Við at kunna meir um viðurskiftini vænta vit, at felagið eisini kann viðvirka til at betra um umtalaðu viðurskifti. Hetta er jú eisini sjálvt endamálið við at hava eitt slíkt felag, greiðir Olga Biskopstø frá.

Blaðið skal eftir ætlan koma út fýra ferðir um árið, og verður tað fíggjað við stuðli frá fyritøkum, sum lýsa í blaðnum.

### Fimm høvuðsevni

Útoyggjafelagið byrjaði arbeiðið við blaðnum fyrst í vár, og nú hava tey so funnið leistin og hava skipað innihaldið.

Ætlanin er at hava fimm høvuðsevni í hvørjum blaðið, harav kunning og tíðindi oyggjana millum er eitt av evnunum.

Harafturat kemur kunning til meginøkið, um hvat hendir á útoyggjunum, umframt at nevndin eisini ynskir at taka ymisk mál upp, sum hava bæði samfelagsligan og politiskan týdning.

Men pláss verður eisini fyri tilfari av tí meiri undirhaldandi slagnum. Í hvørjum blaði verður ein høvuðssøga, umframt at børnini og tey ungu eisini fáa eitt sindur av plássi.

### Umboðsráð valt

Í februar og mars mánaða var nevndin í Útoyggjafelagnum á eini ferð kring oyggjarnar, har tey kunnaðu um felagið og teknaðu limir.

Á hesum fundum komu eisini fleiri uppskot fram, um hvat kann verða gjørt fyri at betra um umstøðurnar á oyggjunum, umframt at bygdafeløg vóru sett á stovn, og síðan var eitt bygdaumboð úr hvørjari bygd valt.

Hesi bygdauumboð sita nú saman í einum umboðsráðið, og fer umboðsráðið í næstum undir at velja eina starvsnevnd.

Síðan er ætlanin, at umboðsráðið skal seta í kortið, hvørjum felagið skal arbeiða við, og hesum skal starvsnevndin síðani arbeiða víðari við.

- Høvuðsmálini verða óivað samferðsla og vinna úti á oyggjunum, men har eru fleiri onnur mál, ið eisini kunnu takast upp, sigur Olga.

### Stevna í Skúvoy

Tann 13. juli skipar felagið fyri einum ársaðalfundi, sum verður hildin í Skúvoy, og samstundis verður eisini skipað fyri einum Útoyggjastevnudagi.

- Dagurin byrjar við ársaðalfundinum, og síðan verður skipað fyri undirhaldi av ymsum slag gjøgnum allan dagin. Um kvøldið verður so dansur, har bæði harmonikan og eitt orkestur fara at seta sítt dám á, greiðir Olga frá.

Sjálv stevnan byrjar tó kvøldið fyri, tá "Filmurin um raning" verður vístur. Hetta er ein filmur, sum fyri nøkrum árum síðani var tikin upp í Skúvoy, og snýr hann seg um raning av fuglaeggum.

Millum tiltøkini á stevnudegnum verður eisini ein útferð við ferðaleiðara, ein frásøgn um Skúvoy, umframt at ætlanin er at fáa Eyðun Eltør, oljumálaráðharran, sum júst hevur fingið málsøkið um útjaðarapolitikk at umsita, á vitjan.

Peningurin, sum kemur inn hendan dagin, fer allur óskerdur til byggingina av einum bygdarhúsið í Skúvoy.

- Vónandi koma fleiri fólk at vitja á fundinum og stevnuni, bæði frá útoyggjunum og eisini meginøkinum, sigur Olga at enda í stuttu viðtaluni.



*Útoyggjarnar í Føroyum hava nú fingið sítt egna blað*